# Tá ið tað varð vitjað í fortíðini

Hesa ferð er íblásturin hjá Jóannesi Hansen til greinina vitjan hjá bónda á Finnufjørðinum, sum mintist, at pápi hansara hevði havt so nógv við føroyskar fiskimenn at gera, at hann tosaði føroyskt, og so ferðin frá Langanesi og vestur til Mývatn




*Langanes*

## 3. partur

**FERÐAHUGLEIÐINGAR ÚR ÍSLANDI**

*Jóannes Hansen*

Meðan vit vóru á Langanes leiðini gjørdist tað, sum Edvard Jacobsen, Edvard í Svínoy sáli, í Minniligar hendingar skrivaði um samskiftið, sum bóndin á Felli á Finnafjørðinum hevði við føroyskar fiskimenn, rættuliga áhugavert. Vit koyra úr Þórshöfn og tvørtur um rótina á Langanesi, um tað ber til at siga tað soleiðis. Tað er skjótt, at vit fara framvið Gunnólfsvikurfjalli, Bakkaflógvin sæst aftur í góðveðrinum, og so eru vit á Finnafjørðinum. Har er eingin samlað búseting.

Nakrir fáir bóndagarðar eru at síggja, og tá ið vit koma til tann fyrsta, sum liggur eitt sindur niðan frá vegnum, stendur á lítla skiltinum Fell. Vit snara niðan móti húsinum, og tað vil so væl til, at ein maður júst fer úr jeepinum og tekur hondina upp fyri pannuna og skymast eftir fremmanda bilinum, sum rullar niðan í túnið millum eldru húsini og nýggjaru typuhúsini við síðuna av. Hinumegin húsini eru fjós og úthús.

Edvard sigur frá, tá ið teir við Polo 12. apríl í 1938 ankraðu inni á Finnafjørðinum, og teir heilsaðu upp á bóndan á Felli, Fríðrik, sum kom umborð. Hann segði teimum, at Polo var størsta skipið, sum hevði verið inni á Finnafjørðinum. Hann kendi væl Símun hjá Póli, skiparan, sum hevði ført John Bull í trý fylgjandi ár, og teir høvdu handlað við hann fyrr og keypt bæði seyð og ís.

Edvard sigur, at Fríðrikur segði teimum, at lodnan kom inn á Finnafjørðin 1. apríl og rendi for inn í urðina, sum lá niðan fyri húsini á Felli, og toskurin aftaná. Og so greiðir Edvard víðari frá:

"Finnafjørðurin stóð fullur av fiski. Vit settu bátarnar út og fingu 2000 fisk tann dagin, sama slag sum Meðallandsfisk, stórur og feitur og fullur av lodnu. Fríðrikur segði, at tann fiskurin steðgaði sjáldan longur enn 14 dagar, tí tá fór lodnan suðureftir, og so varð. Hetta var 12. apríl. Dagin eftir fingu vit 2500 fiskar, og so minkaði tað so líðandi. Síðani royndu vit av Finnafjørðinum út móti Fagranesi og inn móti Eiðsvíkini og fingu eitt sindur av fiski. So bleiv aftur lágætt, tað vil siga sunnanvindur, og vit fóru norður aftur um Nesið. Tá veðrið var gott, royndu vit í Stronginum, sum gongur úr Tanganum á Nesinum. Har var altíð væl at fáa av góðum fiski".

Ein sera góð lýsing av, hvussu føroyska fiskaríið gekk fyri seg á Langanes leiðini í mong ár.

Hesin lesnaðurin er púra frískur í huganum, tá ið vit stíga úr bilinum og heilsa upp á mannin undir vegginum á Felli. Vit biðja góðan dag, og eg spyrji, um pápi hansara æt Fríðrikur. Hann heilsar aftur og spyr, hvørji vit eru. Tá ið hann frættir, at vit eru føroyingar, smílist hann og bjóðar okkum inn.

– Jú, pápi æt Fríðrikur. Hann doyði í 1993. Hevði hann verið her í dag, so hevði hann tosað føroyskt við tykkum. Hann hevði so nógv við føroyingar at gera, at hann hevði lært føroyska málið heilt væl, greiðir Jósup á Felli frá.

Jósup undrast, hvussu vit hava innlit í hesi viðurskifti, tá ið spurt verður, um lodnan eisini í ár kom á Finnafjørðin um 1. apríl og toskurin fjúrtan dagar seinni. Vit vísa honum tað, sum Edvard skrivaði. Tær báðar fittu abbadøtrarnar, sum eru komnar av Akureyri at vitja abban, hjálpa honum at gera kaffi. Áðrenn vit setast við køksborðið við kaffikoppunum, vísir hann okkum inn í stovuna. Har er stórt borð, og myndir av tveimum fólkum eru á bróstinum.

– Konufólkið er mamma mín, sum doyði av tuberklum 1. desember 1938. Maðurin er Símun hjá Póli, skiparin á Polo, sigur Fríðrikur, og vit komast við ungdómsmynd av kenda skiparanum, sum eisini er endurgivin í bókini hjá Edvardi í Svínoy.

– Pápi og Símun vóru vinmenn. Vit samskiftu nógv við føroyingarnar. Teir plagdu at sita við hetta borðið og roykja ball. Tá varð nógv prát og nógvur roykur her í stovuni. Nú er tað langt síðani, og tað er nógv broytt síðani tá, staðfestir Jósup hugsunarsamur og spyr, um Símun hjá Póli framvegis eigur eftirkomarar.

Jú, hann eigur son og dóttur, sum búgva í Klaksvík, svara vit, og bóndin tykist kenna Føroya kortið. Tað sigur hann seg gera, tí hann við íslendskum ferðalagi var í Føroyum fyri nøkrum árum síðani.

### Broytingar

Vit fregnast, hvussu tað stendur til við fólki her á Finnafjørðinum, og hvat tey liva av. Nei, her er lítið fólk. Onkur garður er frágingin, og tað er ilt at fáa unga fólkið at støðast her. Tað veit Jósup sjálvur alt um at siga.

Tey vóru nógv systkin. Hini búgva kring alt landið. Mest á Akureyri og í Reykjavík. Sjálvur eigur hann fimm børn. Tey búgva øll á Akureyri. Ein sonur bygdi typuhúsini, sum standa undir liðini á hesum húsunum. Hann var bóndi, men so fluttu konan og børnini til Akureyrar. So fór sonurin aftaná. Hann arbeiðir har norðuri, og hann fer ikki at flyta aftur á Finnafjørðin. Bóndin hevur tveir teir seinastu vetrarnar verið einsamallur á Felli og ansað seyðinum. Hann ætlaði sær møguliga at taka ein vetur upp á seg afturat. So fór hann at vera 70, og hansara tíð fór at styttast. Tað er sum so manga staðni. Garðarnir verða frágingnir, tí unga fólkið krevur annað enn arbeiði í einsemi, heldur Jósup Fríðriksson.

Søgan er væl kend kring alt Ísland, og bóndin helt seg á ferðini til Føroya fáa ta fatan, at



*Tað var her á bóndagarðinum á Felli, at føroyskir fiskimenn í í tríati árunum keyptu nógv frá Fríðriki bónda*